# Taka frástøðu frá sjónarmiðum Gerhards

**_ Javnaðarflokkurin tekur frástøðu frá sjónarmiðum Gerhards Lognberg, tá hann m. a. sigur, at hann ikki hevði viljað sett ein samkynd í starv**

ORÐASKIFTI
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*– Mínar meiningar kann so eingin taka frá mær, sigur Gerhard Lognberg, sum ikki ætlar sær at taka orðini aftur um, at hann (sum skúlastýhrislimur) ikki hevði sett ein lærara í starv, um hann segði honum, athann var samkyndur*

– Starvsnevndin í Javnaðarflokkinum hevur á fundi í dag viðgjørt greinina hjá Gerhardi Lognberg í bløðunum, har hann m. a. nevnir, at hann sum skúlastýrislimur ikki hevði sett ein samkyntan í starv, var hann frammanundan kunnaður um hetta.

Soleiðis segði Javnaðarflokkurin í tíðindaskrivi í gjár.

_ Starvsnevndin tekur frástøðu frá hesum sjónarmiðum, tí sjálvandi skal eingin borgari í hesum landi verða forðaður í vinnumøguleikum, hvørki av hesari ella aðrari ósakligari grundgeving, sigur Javnaðarflokkurin, hvørs starvsnevnd er av teirri fatan, at tað skal vera rúm fyri øllum borgarum í Føroyum.

Røddir í Javnaðarflokkinum hava verið frammi um, at Gerhard Lognberg skal noyðast at taka orðini aftur, men tað ætlar hann ikki.

Løgmaður segði við bæði útvarpið og sjónvarpið í gjárkvøldið, at málið nú var avgreitt á tann hátt, at Javnaðarflokkurin tekur frástøðu frá nevndu sjónarmiðum, og at meira ikki verður gjørt við málið.

Og flokkurin ger ikki meira við málið.

– Tingbólkurin hjá Javnaðarflokkinum hevur fund aftur hósdagin, og hatta málið er ikki á skránni, sigur skrivari Javnaðarfloksins, Jens Johan Dam.

Gerhard Lognberg sigur í lesarabrævi á síðu 10 í blaðnum í dag, at hann fer at taka orðini í seg aftur.

– Løgmaður vísir á frælsi í flokkinum, hóast hann als ikki er samdur við mær, og tað góðtaki eg eg fult út, sigur Gerhard Lognberg, man hann tekur ikki orðini í seg aftur.

– Sum eg skilji á úttalilsum frá floksfeløgum, so eri eg borin til altarið, klárur at ofra. Tað verður so ein avgerð, um onnur enn eg skulu taka. Men mínar meiningar, tær kann so í hvørfall eingin taka frá mær, sigur Gerhard Lognberg.

# Viva la Republica á vinyl selur

**LP útgávan av Viva la Republica skrivar føroyska hittlistasøgu hesa vikuna, sum fyrsta LP á sølulistanum í 15 ár**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

LP'in hjá 200 er hesa vikuna komin brakandi inn á annað pláss á listanum yvir mest seldu tónleikaútgávur hjá 3'aranum. Hetta er ein søgulig hending, tí tað er fyrstu ferð í 15 ár, at ein føroysk LP er á einum hittlista yvir mest seldu útgávur.

Terji Rasmussen sendi 200 LP'ir av Terja og Føstufressum á marknaðin beint fyri jól, men hóast talan er um ein veruligan klassikara í føroyskum tónleiki, so slapp tann LP'in ikki inn á listan hjá 3'aranum.

### Ring føroysk vika

Einans Curtain Call hjá Eminem er framman fyri Viva La Republica vinyl. Hetta er somuleiðis fyrstu ferð í fleiri mánaðar, at ein útlendsk fløga er ovast á sølulistanum. Samanumtikið er hetta ein ring vika fyri føroyska fløgusølu, tí einans tríggjar føroyskar útgávur eru á listanum.

### Eingin Popplist ella Perlur

Mest selda fløga í seinastu viku Poppkorn er dottin niður á triðja pláss. Hjalti Skaalum eigur fløguna á tíggjunda plássi. Merkisvert er, at Popplist 4, ið hevur verið trúgv inni í toppinum av listanum er dottin heilt út. Tað sama er galdandi fyri Perlurnar hjá Dynamit, ið hevur verið á listanum, síðan hon kom út. Fløgurnar Førist hjá Páll Finnur Páll og Morning Dew hjá Høgna Lisberg, ið komu inn á listan aftur seinastu ferð eru eisini dotnar út.

# Árni Dahl formaður í Skúlabókanevndini

**Landstýrismaðurin í mentamálum hevur valt Árna Dahl at stjórna Skúlabókanevndini**

SKÚLABØKUR
*Tíðindaskriv*




*– Føroyskur skúlaungdómur skal kunna finna sín egna heim á alnetinum, sigur nývaldi formaðurin í Skúlabókanevndini Árni Dahl*

*Foto: Birgir Kruse*

Árni, sum er lærari á Føroya Læraraskúla, hevur verið lærugreinaráðgevi í føroyskum, formaður í Móðurmálslærarafelagnum og hevur rikið bókaforlagið Fannir

Í ár eru 70 ár liðin, síðani løgtingið gjørdi skipan fyri Skúlabókagrunnin. Eftir fleiri tillagingar varð í fjør lýst nýggj lóg um útgávu av undirvísingarmiðlum. Nýggja lógin loysir av »Lóg um útgávu av skúlabókum«, sum er frá 1959.

### Frá bók til miðlar

– Í hesari broyting frá skúlabókum til undirvísingarmiðlar síggja vit greidliga rákið um allan heim serliga hesi seinastu árini, sigur nývaldi formaðurin í Skúlabókanevndini.

– Í skúlunum er bókin ikki longur einasti miðilin, staðfestur Árni Dahl.

Skúlabókanevndin skal sambært grein 4 í nýggju lógini geva stjóranum á Skúlabókagrunninum ráð um útgávu av undirvísingarmiðlum.

– Sum formaður fari eg at síggja til, at útgávuætlan fyri árini fram til 2010 verður orðað, sigur Árni Dahl og leggur afturat, at bókin - eisini skúlabókin - fer altíð at liva.

– Men mítt meginstavnhald er, at allur føroyskur skúlaungdómur skal kunna finna sín egna heim og høvuðsheimildir viðvíkjandi umheiminum á góðum føroyskum máli á alnetinum, sigur nývaldi formaðurin í Skúlabókanevndini Árni Dahl.

Hinir limirnir í Skúlabókanevndini eru Lydia Didriksen lærari, Magnus Tausen formaður í Føroya Lærarfelag, Kristinbjørg Høgnesen studentaskúlalærari og Maria Gregersen, handilsskúlalærari og lestrarvegleiðari. Stjóri á Føroya Skúlabókagrunni er Helena Dam á Neystabø.

Óli P 70 ár

Móttøka í Miðlahúsinum




Í sambandi við at Óli P verður 70 ár týsdagin 24. januar verður móttøka í Miðlahúsinum henda dagin frá kl. 15 til 18.

Øll eru vælkomin

miðlahúsið
í Vágsbotni